# Høgni Lisberg á Biograf tourné

**Høgni Lisberg og Nordisk Film Biografer A/S samstarv í mars um ein konsertferð kring Danmark.**



KONSERTFERÐ

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosilurin.fo*

Í seinnu helvt av mars fer Høgni Lisberg á konsertferð í donskum filmshølum. Konsertferðin verður í samstarvi við Nordisk Film Biografer A/S og talan verður m.a. um kvøld konserterir í Metropol-biografunum í Keypmannahavn og Biocity-biografunum í Århus og Odense.

Lars Møller, frá Nordisk Film Biografer A/S, sigur um konsertferðina:

- Vit hava lagt til merkis, at filmshølini eru sera væl egnaði til konsertir. Man situr ótrúliga væl í setrunum og hetta er gott høvi, at fáa tónleikin settan í fokus. Eisini dámar tónleikarunum sera væl at spæla í filmshølunum.

Nordisk Film hevur áður skipað fyri konsertum við Blue Foundation og Danmarks Radio Big Band, men Høgni er tann fyrsti artisturin, ið fer á eina tílíka konsertferð.

Sølan av atgongumerkjum er byrja og fáast á www.biobooking.dk ella á telefon 70 13 12 11 mellem kl. 9.30 og 21.30. 400 áskoðarar sleppa inn til hvørja konsert. Við í atgongumerkinum á 75 kroner er ein øl sum verður servera ein hálvan tíma áðrenn konsertin byrjar.

Konsertirnar verða:
27. mars: Metropol í Keypmannahavn
28. mars: BioCity í Odense
29. mars: Biocity í Århus
Konsertirnar eru frá kl. 19-20.15

## Vilja hava jarnbreyt

Í Norðurnoregi eru kreftir farnar at virka fyri at fáa eina jarnbreyt ímillum Russland og Norðurnoreg. Russisku megin markið endar verandi jarnbreyt í marknabýnum Nikel, men norska vinnulívið fegið hava eina nýggja breyt ímillum Kirkenes og Murmansk. Vinnulívsfólk siga, at tað verður neyðugt við betri sambandi til oljuvinnuna. Men russar ivast. Millum annað stúra teir fyri, at skip fara at velja norðurnorskar havnir heldur enn Murmansk.

## El úr Íslandi

Íslendingar hava nógva orku, og nú siga teir seg vera hugaðar at leggja eina elleiðing úr Íslandi til Føroya og víðari til Skotlands. Tá Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, hitti sín íslendska starvsbróður fyrr í mánaðinum, fekk hann at vita, at íslendingar arbeiða við hugskotinum. Tað verður kortini ikki beinanvegin, at íslendingar fara undir ætlanina, tí hon liggur eini 10 ella kanska 20 ár frammi í tíðini.




